## Bygdaleiðir spæla við á Summar Festivalinum




Bygdaleiðir seta eyka bussar inn á farleiðini millum Havnina og Klaksvík um vikuskiftið. Nógv fólk atla sar á Summar Festival um vikuskiftið, og tað fyrireika Bygdaleiðir hjá Strandferðsluni seg eisini til. Bygdaleiðir eru klárar við eyka kapasiteti á leið 400 í sambandi við festivalin. Eyka bussar verða tokir til hesar túrar Hósdagin: Úr Tórshavn 18.20 og 20.00. Úr Klaksvík 24.00
Fríggjadagin: Allar seinnapartstúrarnar úr Tórshavn frá 13.50 at rokna. Úr Klaksvík 24.00.
Leygardagin: Allir seinnapartstúrarnar úr Tórshavn frá 12.20 at rokna. Sunnumorgun úr Klaksvík

# Gingu í barnagarði hjá sangaranum í Alphabeat

**Rúna og Esmar úr Klaksvík, og Karl og Maria av Viðareiði, hava gingið í barnagarði í Kongens Enghave í Keypmannahavn, og har starvaðist Anders úr Alphabeat, innan hann fór til London ar gerast kend poppstjørna. Nú Alphabeat vitjar á Summar Festivalinum gleða børnini seg at síggja Anders aftur**



*Rúna, Esmar, Karl og Maria kunnu fegnast um, at Anders úr barnagarðinum í Keypmannahavn nú kemur til Klaksvíkar sum heimsstjørna, so tey sleppa at hitta hann aftur*

*Mynd: Høgni Thomsen*

SUMMAR FESTIVALUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Rúna, Esmar, Karl og Maria eru spent í hesum døgum. Tá tey gingu í barnagarðinum í Kongens Enghave í Keypmannahavn, starvaðist tann seinni so kendi Anders úr Alphabeat har. Nú eru tey spent uppá at síggja hann aftur, tí teimum dámdi hann vær.

- Hann starvaðist har í eitt ár, og hann spældi guitar fyri teimum, sigur Sylvia Sivertsen, sum er mamma at tveimum av børnunum..

Yngstu børnini gingu í barnagarði, meðan tann elsta gekk í frítíðarheimi, men stovnurin er allur í einum, so øll børnini kendu Anders væl. Børnini eru frá 5 til 8 ár. Teimum dámar væl tónleikin hjá Alphabeat og keyptu sjálvandi fløguna, tá tey búðu niðri.

Tá tað sá út til, at Alphabeat fékk vind í seglini, gavst Anders í barnagarðinum, og í fjørheyst fór Alphabeat til London,har tað av álvara eydnaðist bólkinum at fáa undanvind og gerast eitt stórt poppnavn.

Men Rúna, Esmar, Karl og Maria kunnu fegnast um, at Anders úr barnagarðinum í Keypmannahavn nú kemur til Klaksvíkar sum heimsstjørna, so tey sleppa at hitta hann aftur.

# Teitur og Sting syngja fyri Tibet

**Teitur Lassen er millum stórar heimsstjørnur, ið eru við á net-útgávu, har sungið verður fyri Tibet. Sting og Alanis Morissette og mong onnur eru við**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

At stuðla Tibet er ein søk, sum alt fleiri taka undir við, og nú innan olymisku leikirnar er etta eisini sera aktuelt.

Og nú er á tónleikasíðuni itunes komin ein útgáva, ið nevnist Songs for Tibet.

Har hava stórar heimsstjørnur givið sítt íkast, og eisini føroyski sangarin og sangskrivarin Teitur Lassen er við, saman við Tarira.

Teitur tekur lut á Songs for Tibet við lagnum All My Mistakes.

Umframt Teit, sum her er millum góð og kend fólk, eru nøkur av luttakandi nøvnunum Sting, Rush, John Mayer, Alanis Morissette, Joan Armatrading, Jackson Brown, Ben Harper og onnur. Løgini á Songs for Tibet fáast á itunes.com

